# FAGRIKLETTUR

## KG-561 V/ FISKILOYVI Í BÓLKI 4A

LONGD 16,86 · BREIDD 4,86 · DÝPT 2,64
ÍALT 216,32 RÚMMETRAR

TIL SØLU



| ÚTGERÐ V.M | SLAG | ÁRG. |
|---|---|---|
| ÍSLANDS RULLA | DNG/POMEK | 02/1999 |
| GUMMIBÁTUR | VIKING 6 PERS. SÝN. OKT. 04 | 10/2001 |
| 3000W INVERTER (220V) | DAKAR | 03/2001 |
| HALON ANNLEGG | GINGE. SÝNAÐ OKT. 04 | 02/1999 |
| YVIRHÁLING MOTOR | MEKANIK, RUNAVÍK | 10/2003 |
| OLJUFÝRING | LX32 | 02/2001 |
| KØLISKÁP | IDÉ LINE | 11/2001 |
| SJÁLVSTÝRARI | TIMCO AP-110 | 10/2003 |
| 2 X VHF | SAILOR RT-2048 | 03/1999 |
| STÓRAN SENDARA | FURONE SSB TRANSIVER | 03/1999 |
| EKKOLODD | FURUNO FCV-581L | 03/1999 |
| GPS | SHIPMATE RS 5800 | |
| PLOTTARA | SHIPMATE RS 2500 | |
| RADARA | FURONO MARINE RADAR M1621 | 01/1998 |
| FARTELEFON | MOTOROLA | 03/1999 |
| DUPULT EL. ÚTBLØÐING/VASKIKAR | FJM RUNAVÍK | 11/2003 |
| SLENGRIKJALAR | VÁGS SKIPASMIÐJA | 09/2002 |
| NÝGGJAN SKÚR | VÁGS SKIPASMIÐJA | 09/2002 |
| 20 X 360L KØR | | |
| 10 AUT. OILWIND SNELLUR | | |

LOKIÐ HØVUÐSSÝN SEPT.-OKT. 2004

SPURNINGAR OG BOÐ V.M KUNNU SKRIVAST TIL WW@POST.OLIVANT.FO

PRÍSUR 1.500.000,-

VASTI 457171

# Kunngerð

**til**
**veljarar í Elduvíkar Kommunu**
**til kommunuvalið 9. november 2004**

**Brævatkvøður**
Veljarar í Elduvíkar Kommunu, ið sambært vallógini lúka treytirnar fyri at greiða brævatkvøðu, ella sum vegna sjúku ikki eru før fyri at koma á valstaðin og tí ynskja at greiða brævatkvøðu heima, kunnu venda sær til kommunuskrivstovuna á tlf. 441348 til og við 8. november 2004, kl. 15.00.

**Valkort**
Við hesum verður gjørt kunnugt, at til kommunuvalið eru valkort send øllum veljarum í kommununi. Um onkur, ið heldur seg hava atkvøðurætt, ikki hevur fingið valkort, ella okkurt annað er komið skeivt fyri, skal verða sagt kommunuskrivstovuni frá á tlf. 441348 í seinasta lagi 8. november 2004.

**Elduvíkar Kommuna**

Sosialurin
Sosialurin
i




FØROYAPRENT
www.foroyaprent.fo · Tel. 314 555 · Fax 318 026

i
Sosialurin

Gallarí Jinx



Osla Rannvá Svensson

Sýnir fram málningar í november

tel 317101 · jinx@jinx.fo

Sosialurin 341800

**Toll- og Skattstova Føroya Stýrið**

## Afturlatið

Vegna starvsfólkafund 3. november 2004 lata allar deildir hjá stovninum aftur kl. 11.00.

Undantikin er tó deildin á Tvøroyri, sum er stongd allan dagin.

**Toll- og Skattstova Føroya, Stýrið**

L U R I N . F O

i
Sosialurin

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## KUNNGERÐ

Boðað verður frá, at býráðsvalið 9. november 2004 verður frá kl. 10.00 til 20.00.

Valt verður soleiðis:

1. Fólk í Havn, Norðradali og Hoyvík, á Hvítanesi og Sundi velja í ítróttarhøllini á Hálsi
2. Fólk á Argjum og í Syðradali velja í róðrarneystinum á Argjum
3. Fólk í Kaldbak og Kaldbaksbotni velja í skúlanum í Kaldbak
4. Fólk í Kollafirði velja í skótahúsinum í Kollafirði
5. Fólk í Kirkjubø og á Velbastað velja í skúlanum á Velbastað
6. Fólk í Hesti og Koltri velja í bygdastovuni í Hesti
7. Fólk í Nólsoy velja í felagshúsunum hjá Ungmannafelagnum Royndini í Nólsoy

Vart verður gjørt við, at valrætt til býráðsvalið hava tey, sum

a. hava fylt 18 ár og annars lúka treytirnar fyri valrætti og valbæri til Føroya løgting.

b. standa í fólkayvirlitinum í Tórshavn í seinasta lagi tvær vikur fyri valdagin.

Ríkisborgarar úr hinum norðanlondum kunnu, hóast teir ikki eru valbærir til Føroya løgting, velja til kommunuval um so er, at teir hava havt fastan bústað í Føroyum seinastu 3 árini undan valinum.

Bert tey, sum standa á vallistanum, sleppa at velja.

Um onkur er komin á vallistan, sum ikki longur býr í kommununi, sleppur viðkomandi ikki at velja.

Eisini verður boðað frá, at valkort til býráðsvalið eru send teimum, ið standa á vallistanum. Um veljari hevur ikki fingið valkort, ella okkurt annað er komið skeivt fyri, skal sum skjótast boðast Snarskivuni frá hesum.

Harumframt verður boðað frá, at veljarar, ið sambært vallógini lúka treytirnar fyri at greiða brævatkvøðu, kunnu atkvøða í snarskivuni.

Sjófólk, sjúk og onnur, sum ikki kunnu koma á valstaðin, kunnu boða frá á Snarskivuni, tlf. 302010, vanliga dagar frá kl. 9.00-16.00, tó hósdag til kl. 18.00.

Í seinasta lagi mánadagin 8. november, kvøldið fyri valið, kunnu brævatkvøður eisini greiðast á Snarskivuni kl. 16.00-22.00.

**Felagskommunala valnevndin fyri bý- og bygdaráðini í Tórshavnar-, Nólsoyar-, Kirkjubøar- og Hest kommunu.**

SNARSKIVAN
www.torshavn.fo

# Til sølu

## Nøkur góð tilboð eru á goymslu




SP/F **NORÐ TRUKK**
Mykinesgøta 3 · Postrúm 1315 · 110 Tórshavn
Tlf. 315136 / 51 51 36 / 31 03 88
T-post: nordtruk@nordtrukk.fo

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

**B36-arar!**
Innandura-venjingarnar byrja aftur mánadagin 3. november í Ítróttahøllini!

| Kl. | Lið |
|---|---|
| **Mánadagur** | |
| 15.00-16.30 | Smápiltar føddir 1995/96 |
| 16.30-17.15 | Pinkulingar føddir 1997/98 |
| 17.15-18.00 | Børn fødd 1999 og yngri |
| **Mikudagur** | |
| 15.00-16.00 | Pinkur føddar 1995/96 |
| 16.00-17.00 | Gentur 10-12 |

B36 - vit síggjast í ítróttahøllini!

SISERO 351800

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við